Nú byrjar dansitíðin – ja. Annað jólakvøld var eitt av teimum størstu veitslukvøldunum hjá føroyingum, og tíðina eftir jól vóru gildini og veitslurnar fleiri. Á nýggjárinum ar aftur veitsluhald, síðani á Trettinda, kanska eisini á gomlu Trettinda onkustaðni, á Kyndilsmessu og at enda á fastalávint, tá dansitíðin var av. Men nú var tað fyrst jólini, vit tosaðu um. Tað verður so tíðum tikið til orðini í tí kenda niðurlagnum:

Gud man ráða
hvar vit drekka
onnur jól.


Hesi orðini sipa ikki, sum mong hava viljað hildið, til heiðinskap, ólevnað og drykkjuskap í kristna jólahaldinum, men vísa til at annan jóladag var kristna jólahøgtíðin av, og hin parturin av jólahaldinum tók við. Og tann parurin hevur onki við kristin jól at gera, men stavar upprunaliga frá tí, at kirkjuleiðarar blandaðu føðing Krists upp í eitt fyrndargamalt veitsluhald, eldri enn kristna jólahaldið. Tí tosa vit á okkara leiðum um jól og ikki Kristmessu, ið høgtíðin væl kundi itið, eias og aðrar messur.




Fyrilestur Eyðun Andreassen, fóllkalívsfrøðingur helt í Útvarpinum 2. jóladag


Dansitíðin er ikki liðug











Hetta við einari serligari dansitíð er annars ein forvitnisligur spurningur fyri seg. Í øllum nýggjari bókmentum og á manna munni verður henda tíðin nevnd og uppfatað sum ein elligamal siður, ið føroyingar av sínum eintingum hava hildið fast um, so at siga álagt sær sjálvum, og hildið verður rættiliga fast um henda sið, fyri ein part í pietetsfullari virðing fyri gomlum siðum.

Eg havi ikki, og ongin annar mær vitandi heldur, givið mær far um annað, enn at so mátti vera, og tað hevur ikki komið til mín at fregnast eftir, hvussu vorðið nú var við hesum, fyrr enn Petur Martin Rasmussen kemur og setir fram sera áhugaverd sjónarmið um hesa sohildnu elligomlu dansitíð. Tað ger hann í síni áhugaverdu og drúgvu doktararitgerð um føroyska málspurningin, ið kallast Den færøske Sprogrejsning med særlig henblik på kampen om færøsk som kirkesprog.

Spurningurin, Petur Martin totast við, er støðan millum kirkjuligt og verðsligt lív. Í hansara gransking um føroyska málreising er spurningurin sjálvsagt aktuellur, tí kirkjan var donsk við vilja til at fremja tað danska í Føroyum, kvæðini føroysk og grundstuðlar undir føroyska málinum, kirkjan aftur sjálvsagt móti verðsligum ólevnað, ið dansurin skuldi eitast at fremja.

Tað áhugaverda, ið Petur Martin kemur fram til er, at henda avmarkaða dansitíðin valla er serliga gomul skipan, at hon er íkomin eftir trýsti frá bøndrum og prestum, og at mótstøðan hjá prestunum móti tí føroyska dansinum ikki fyrst og fremst er kirkjuliga grundað, men heldur búskaparliga. Hann skrivar (umsett til føroyskt): »Dansitíðin endaði, tá føstan kom, og tá føstan var av, kom útiarbeiðið fyri aftur, og tað stóð við til út í oktober. Tað er onki at ivast í, at tað sum býr undir hesi avmarkaðu dansitíð, er andstøðan frá prestum og bøndrum. Bøndurnir hava havt búskaparligar grundir: tað galt hjá teimum um ikki at spilla tíðina við dansi, og prestarnir, ið eisini vóru bøndur og tí høvdu búskaparlig áhugamál at røkja, løgdu so eitt kirkjuligt/asketiskt sjónarmið omaná hitt búskaparliga, og grundaðu tað við føstuni«.

Petur Martin hevur varnast, at ongastaðni í keldum er nøkur serlig dansitíð nevnd. Lukas Debes í 1673 tosar um dans, men skrivar bara at dansað var í brúdleypum og á jólum, og heldur ikki Svabo í 1781/82 nevnir dansitíðina, einans brúdleyp og jól, tá dansað varð. Debes skírir dansin sum »unyttig tidsfordriv eller forfængelig lystighed«, og Svabo kallar kvæðini »Nogle Alderdoms levninger og mærkværdigheder«. Møguliga liggur í hesum, at teir hava hildið lítið um vanliga dansin, teimum hevur heldur hóvað brúdleyps- og høgtíðsdansin, og nógv bendir á, at gerandisdansurin kanska ikki altíð hevur verið so siðiligur.

Mangt bendir á, at Petur Martin kann hava rætt, tá hann nevnir hesa sterku mótstøðu móti dansinum. Áhugaverd er hansara niðurstøða, har hann hugsar sær til at helst var vilji til heilt at forkoma dansinum, og tann avmarkaða dansitíðin kann vera eitt kompromis, tí fólk vildu ikki gevast at dansa. Føroyingar høvdu onki annað.

Tað er tí ikki vist, at dansitíðin frá jólum til fastalávint er fyrndarsiður, men góður siður kann hann vera fyri tað, verður at halda fast við, tí hann gevur árstíðini dám, og tykist eisini at dugna dansinum. Dansifólki dámar eisini henda sið.

Hesar gomlu veitsluhøgtíðirnar, eg nevndi, fóru fólk at vitja. Heilar bygdir fóru burtur í aðra bygd at halda veitslu og dansa eftir føstum siði. Summar bygdir vóru jólabygdir, aðrar nýggjársbygdir, kyndilsmessubygdir og fastalávintsbygdir. Robert Joensen hevur millum annað lýst hesar siðir gjølla í bók síni Høgtíðir og veitsluhald á vetri, og sigur m.a. at jólabygdir vóru kirkjubygdir, sum rímuligt er. Tað var ikki tilvildarligt, hvussu vitjað varð, lagið var at vitja aftur. Gleðin við at koma á vitjan var stór, men ikki minni var gleðin við at sýna blíðskap. Slíkar vitjanir vardu bæði ein og stundum tveir dagar.

At fáa fremmant fólk upp í dansin var ein frægd, tí ivaleyst kundi tað tykjast møðsamt hjá fólki at dansa í lítlari bygd, bara tey somu. Dansifeløgini í okkara tíð hava eisini sannað hetta, og vitja hvørt annað dúgliga í dansitíðini, serliga á fastalávint, tá dansitíðin er at enda komin. Tað er frægd í at hoyra onnur kvæði og aðrar skiparar, og gongur dansurin væl, hava summi líka góða løtu við at seta seg niður at lurta, sum at dansa við.

Her fái eg hug at venda mær til Jóannes bónda, ið skrivar um at lurta eftir dansi. Hann skrivaði eina grein í norska tíðarritinum Norsk Årbok í 1924, har hann greiðir frá trimum kvøðarum. Orsøkin til greinina var tann, at hollendingurin Jan de Vries, ið m.a. hevði skrivað eina stóra ritgerð um okkara Sjúrðarkvæði, í hesum tíðarriti hevði eina grein um føroysk kvæðaeyðkenni, og kom til ta niðurstøðu, at tey vóru vánaligur kvæðaskaldskapur samanborin við annan norðurlendskan kvæðaskaldskap. Jóannes tók hetta inn at sær, og skrivaði afturímóti við at lýsa kvøðing á gólvi, og tað skapanarmegi, sum kemur fram tá hjá einum góðum skipara, tá væl vil til. Ein av kvæðakempunum, hann lýsir, kallast við dulnevninum Jøkil Buason, ein eldri suðringur, ið ikki vildi hava navn sítt á prent. Hann er kendur, men lat tað fara. Jóannes lýsir hann í einum grindadansi í heimbygd hansara, hagar Jóannes og ein vinmaður koma til gongu. Nú var tað dansitíðina, vit skuldu tosa um, men at hetta er grindadansur hevur onki at siga fyri lýsingina. Hon er almenn. Jóannes skrivar: »Tað var um dimmið, tá ið vit komu til bygdar. Grindin var deyð, grindadansurin gekk úti á grønum vølli. Vit nærkaðust okkum. Tá sá eg Jøkil fyrstu ferð; hann skipaði Einars rímu Tambarskelvar; einir tólv av bygdamonnum hansara gingu honum næst og kvæðu við honum, einir hundrað mans kvóðu niðurlagið. Grindamenn sótu í smáflokkum á vøllinum uttan um dansin og hugdu at og lýddu á, eingin fór upp í ringin. »Vit fara heldur ikki upp í«, segði eg við felaga mín, »lat okkum seta okkum eisini«. »So skal vera«, svarar hann, »at fara upp í dansin nú, er halgibrot«.

Himin var heiður og blika logn. Dimmblá fjøll umgirdu bygdaláglendið. Rustir, skørð og tindar strikaðu dagsglæmuna, sum nú var at hvørva í vestri. Drangarnir stavaðu í tann spegilsblanka sjó á vágini. Bøksl við bøksl og lið um lið lógu 300 grindahvalir til hvíldar á tí hvíta sandinum.

Miðskeiðis í hesi náttúrunnar dýrd, her á grønari grund, tráddi hetta forna fólkið, í fornum búnaði, henda forna føroyska dansin. Og á fornum máli og í fornum lagi bóru kvøðararnir fram søgur um »fornar kempur í Noregi«.

Dansurin livdi søguna, og vit sum sótu uttanum livdu hana við. Vit vóru hjá, tá Einar kemur úr bardaganum við risan norði í Áskógum, einsamallur við brotnum spjóti, og Ólavur kongur spyr hann: »Einar, hvar er liðið tað, ið eg á skógin sendi«, og Einar svarar honum aftur meðan »blóð um akslir fleyt«: »Her skalt tú síggja svørðið tað, ið eg við risan breyt«. Vit eru inni í kongshøllini, tá hirðin fellur í fátt, tí »nú er eingin í Tróndheimi, ið risan tekur av lívi«; og tá ein av kongsmonnunum ynskir: »Gævi at Kjartan Ólavsson, hann var í borgum her«, men fær til svar at »deyður er Kjartan Ólavsson, hann liggur í døkkari mold«. Tá lítur illa út, tó vit ernast uppaftur, nú ein gamal maður trívur í og sigur at »enn eru kappar á Íslandi, tó Kjartan hann er deyður« og vísir á Ílint sterka.

Aftur eru vit hjástaddir, tá Einar stýrir Orminum »við líðir fram« út av Noregi á Íslandsferð, og risin fær finnin at royna at forða ferðini: »Risin talar til gandafinn, biður rímur binda, bæði skjótt og skundiliga, aftaná Ormin senda«. Finnin roynir; men stýrið og gullbjálkin »eru sett við mentum teim, ið Ólavur kongur læt skera«, og »Einar heldur um gullbjálkan, nú hevur hann Gud í munni«; har batti eingin finnagandur, »Ormurin rendi í havið út og legðist til ymsar kjálkar«.

Enn eru vit hjá, tá teir drekka jól í kongshøllini í Tróndheimi, »tá drekar í Dovrafjøllum tóku at ýla hátt, og dagurin tók at dimma«, og risin óvart og óboðin stígur inn um gátt og so ráðaríkur sigur: »Sit væl vælsignaður Ólavur kongur, eg drekki við tær í nátt«. Tá falla kongsins menn í fátt, men Ílint sterki, sum komin er av Íslandi, stígur fram og tekur til orða: »Tað er ikki trøllum vant at drekka við kristnum monnum«. Hann leypir á, bardagi verður so at brakar í høllini, borð og borðstólar ruddast fram á gólv, neipar ganga sundur, út av durum berjast teir, úti á geilum kemst risin undir og Ílint á; har verður risin at lata lív.

Vit hava verið í Noregi og vitjað Ólav kong og Einar Tambarskelvar, vit hava verið í Íslandi at heinta Ílint sterka at drepa illvættið, ið ónáðir Noregis monnum og Noregis konga, vit hava aftur verið í Noregi og lýtt á drekarnar, sum ýlt hava í Dovrafjøllum, og sætt risan grópandi upp dalar og fjøll koma at spilla jólaveitsluna í Tróndheimi, og vit sóu Ílint taka hetta illmenni av lívi.

Nú eru vit aftur í Føroyum í einum føroyskum bygdarlagið eina blíða hásummar nátt. Jøkil og kvøðararnir al[illegible], sum í dansinum førdu okkum út á hesa søguligu ferð, eru nú møddir og hava sett seg niður. Teir sum kvóðu, og vit sum sótu og lýddu á, hava upplivað eina hátíðar stund. Henda stund, sum mangar aðrar staðir, sigur frá hvussu tað ber til, at hesir fáu føroyingarnir sum, undir fremmanda valdi, livdu á hesum útskerum, innibyrgdir øld eftir øld, hagar til dags hava verið frískir í huga sum fyrsta dagin teir settust á skerini«.

Mangar góðar løtur í føroyskum dansi, ja, og ikki lætt at skilja mótstøðuna móti dansi og kvæðum. Fyrst kirkjan og prestarnir, seinni indremissionerar og baptistar, ið hava lagt doyin á at forkoma hesum mentunartátti. Eg undrist stundum á, hvussu hesi fólkini bera seg at, sum enn í dag troðka seg inn á øll heimsins fólkasløg. Er tað eisini fyri at køva fólkanna mentan og geva teimum okkara vesturlendsku, sonevndu kristnu mentan, við tí fullkomnu tilbiðjanini av heimsins skreyti og gulli, ið ikki hevur annað við sær enn fleiri keyparar til ónyttuframleiðsluna av fjasi, sum vesturheimurin byggir livifót sín á. Tað kann vera, at sonevnt ólevnað, stundum hevur verið í onkrum dansihøli, men ikki tykir mær, at tað man vera høvuðsgrundin hjá hesum mentanarandstøðingum, tí eitt er vist, at slítur tú røturnar, kemur ófriður á fólk, og tey krevja nýggjar røtur, helst í potti við handilsmold og handilstøðum. Og tann pottin kanst tú flyta, hagar tú vilt. Urtin er einsamøll í pottinum, ið er av hørðum, køldum tilfari, og ikki longur fest í moldina, hon rann út saman við øllum hinum. Tað mentunarleysa menniskjað er lætt at manipulera við í mangar ættir. Tað man vera meiningin, og tað tykir mær er synd. Hesir mentunartýnarar munnu vera nakað rótleysir og mentunarloysingar sjálvir, hóast virksemið hjá mongum trúboðara krevur allar størstu virðing av okkum, fyri dirvi, sakn, ágrýtni, góðan vilja og reint hjarta.

Kristian Osvald Viderø hevur kvæðini við sær, har hann er á sínum mongu og drúgvu ferðum, og hugtakandi er at lesa í bókum hansara, hvussu lítið høpi er í mentunartýningini, tí hann onga løtu er í iva um munin millum hitt himmalska og hitt verðsliga. Burtur úr einari samrøðu, hann endurgevur úr heimbygdini, taki eg hetta brotið:

»Tað segði Evensen við teg eitt sinn, hann yvirhoyrdi teg í skúlanum, hann bað teg nevna sær ein, sum sveittaði blóð; tú svaraði: »Tað veit eg«. Evensen tók tað uppaftur: »Nú, so, Angankári? Hvaðan veitst tú tað? Tá kvaðst tú: Ríða teir í Tyrnisdal, svá fast av miklum móð, svá rann Angankári, at Grani sveittaði blóð«. Evensen helt, at tú hevði fingið gott í beinini, men ikki til at náa himninum: »Tú hevur fingið sterk bein til at tvassa undir Hagabrekku, men longur vera tey ikki at bera teg«. Seinni spurdi Evensen ein annan um tað sama, og drongurin visti beinanvegin svar: Jøkil! Evensen hvakk við: Ná, svá, tað veitst tú, men hvaðani veitst tú tað, lat meg hoyra: »Tey syftust bæði hart og leingi, Gnippa væl seg stóð, klæði gingu úr seymi sundur, og Jøkil sveittaði blóð«. Tá læt í Evensen: Tú hevur verið væl fóðraður har uppi í Hargargarði, har hørgin var í forðum, gudahúsið; tú hevur fingið sterkar leggir, men einans til at tvassa undir Hagabrekku; teir verða ikki at bera teg langt niðan í Himnabrekkuna, tú mást lesa meira í bibliuni«.

Tað er so rímiligt, at høgtíð og dansur hoyra saman, og at avnokta mentan og list í tí verðsliga lívinum er fángt og fávitskut. Vit hava tann illa vana, at vilja meina øðrum tað, okkum sjálvum ikki dámar. Sum nú við víninum. Ein dropi av tí sterka er mangan góður eina dansinátt. Misbrúk er av tí illa, men nú aftur kjakast verður um rúsdrekkalóg, er kanska upp á sítt pláss at spyrja, hví misbrúkararnir skulu vera teir, ið avgera, hvat vit øll onnur sleppa at smakka okkum á. Tað er líka so ørt, sum at banna øllum at koyra í bili, tí at summi eru óskettin og elva til ferðsluskaðar. Hví vil ongin forbjóða bilum av hesi grund? Tí vit vilja øll hava bil. Men tey, sum ikki drekka, vilja helst forbjóða øllum øðrum at drekka eitt glas, bara tí teimum persónliga ikki dámar tað. Og sama er við teimum, sum ikki hóva føroyska dansin. Teirra persónliga meting skal vera nóg góð grund til at onnur helst ikki áttu at dansa.

Men rætt skal vera rætt, og tað er, at tann beinleiðis andstøðan móti tí føroyska dansinum, og dansi yvirhøvur, ið hjá so mongum fólkasløgum er aðaltátturin í gudsdyrkanini, henda andstøðan er ikki einans orsøkin til at føroyingar hava forsakað sína egnu mentan, og harvið nakað av sær sjálvum – eyðvitað. Tann rútmiski musikkurin, sum annars er upprunnin gjøgnum øldir hjá fólkasløgum í tí parti av verðini, vit, ið klettafast trúgva á, at alt her í okkara vesturheimi er vælsignað og gott, hevur í amerikanskum sniði, otað alt annað burtur úr tí mentunarliga medvitinum hjá ættarliðunum frá 60-árunum og seinni. Eisini sálmasangin, so at sælan nú er at finna í gospelsanginum, ið er tann kristni variantin av tí annars heidna rútmiska musikkinum, og gevur teimum, ið áður stríddust móti føroyskum dansi, sítt alibi til at dyrka rútmiskan musikk. Og dansurin, sum tó hevur eins samansetta rútmu og nakar rútmiskur musikkur, men sjálvsagt, hon vendir ikki so nógv úteftir, er ikki so larmandi, hoyrist ikki væl, bergtekur ikki beinleiðis gjøgnum tey musikkteknologiski hjálpartólini.

Annað jólakvøld fara tó nøkur aftur í føroyskan dans, og latið hann ikki detta niðurfyri. Tað er ongin grund til tess. Hvørki so ella so, tí so verða vit tað fátækari, og dansurin enn meira forfjónaður til eitt innanholað retoriskt element í háfloygdum tjóðskaparretorikki. Hann hevur betri uppiborið.

Útvarp Føroya 2. jóladag